## LÍF fekk ikki hol á



Hvørki KÍ ella LÍF megnaðu at skora, tá 1. deildarliðini spældu landskappingardyst í Klaksvík mikukvøldið. LÍF hevði leikliga yvirvág og hevði størru málmøguleikarnar, men heimaliðið var eisini við í dystinum og hevði sínar kjansir. Í seinna hálvleiki setti LÍF trýst á og flutti nógv fólk, meðan heimaliðið lúrdi við kontraálopum. Fleiri málkjansir vóru í seinna hálvleiki, men ongantíð fór bólturin um málstrikuna.

LÍF hevur verið við í stríðnum um uppflyting til Formuladeildina, men hetta stríðið var avgjørt týskvøldið, og B71 og AB eru uppflytarar.

## Klaksvík fingið nýtt hondbóltsfelag

Í farnu viku var eitt nýtt ítróttarfelag upptikið sum limur í ÍSF. Tað var felagið Team Klaksvík, sum er eitt nýstovnað hondbóltsfelag. Felagið ætlar at hava manslið við í kappingini í vetur. Formaðurin í Team Klaksvík, Fríðin Ziskason, sigur við Norðlýsið, at høvuðsorðsøkin til, at teir fóru undir at stovna nýtt felag var, at teir ikki sleppa at spæla hondbólt í Stjørnuni.

- Tað er eingin loyna at Stjørnan ikki hevur loyvt mannfólkahondbólti seinastu árini, sigur hann.

Nevndin fyri nýggja felagið er mannað soleiðis: Fríðin Ziskason, formaður, Niclas Niclasen, kassameistari, Meinhardt Joensen og Kristian Andreasen.

# Støðug avrik sendu AB í Formuladeildina

**- Serliga eftir summarsteðgin hava vit spælt støðugt, og royndirnar hjá spælarunum á liðnum komu væl við í teimum avgerandi dystunum, sigur Rúni Nolsøe, spælandi venjari hjá AB**



*Spælandi venjarin Rúni Nolsøe og toppskjúttin Allan Mørkøre fegnast um uppflytingina til bestu deildina. Nú er spurningurin, um teir báðir halda fram í AB, og tað svarið er ikki greitt enn*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

FÓTBÓLTUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Argja Bóltfelag fer næsta ár at spæla í fremstu mansdeildini í fótbólti fyri fyrstu ferð nakrantíð. Felagið hevur í nógv ár stremba eftir at vinna fram millum landsins fremstu feløg, og tað er nú eydnast.

Hetta er aðru ferð, at høvuðsstaðurin hevur trý lið í fremstu deildini. Í 1977 spældu HB, B36 og Fram við í 1. deild, men tað gjørdist bert til eina árið, tí Fram flutti niður aftur beinanvegin.

Nú verður stóra takið hjá teimum, sum varða av AB, at fyrireika liðið væl til kappingina í Formuladeildini og at fáa liðið at støðast har.

### FSV argaði eina løtu

Týskvøldið spældi AB á heimavølli ímóti FSV2004, og tann tryggi 4-1 sigurin hevði við sær, at uppflytingin til bestu deildina var veruleiki.

AB-liðið tóktist at byrja við eitt sindur nerva av týdninginum, sum dysturin hevði, men heimaliðið var tó við yvirlutan í fyrra hálvleiki, og tað eydnaðist eisini at gera mál. Jón Nielsen kom at standa væl fyri eftir hornasparksstøðu, og so sendi hann bóltin í málið til 1-0 til AB.

FSV2004 byrjaði seinna hálvleik betur enn heimaliðið, og gestirnir úr Vágum javnaðu AB-leiðsluna, men heimaliðið kom fyri seg aftur, og aftur var tað Jón Nielsen, sum lá fram við. Hann skoraði til bæði 2-1 og 3-1, áðrenn AB-toppskjúttin, Allan Mørkøre, staðfesti sigurin við máli til 4-1.

Eftir dystin var stórur fagnaður á Argjum, og argjafólk vóru komin úr øllum ættum at fylgja søguliga dystinum.

### Rúni ivast

Tveir av stuðulsspælarunum hjá AB í hesum kappingarárinum hava verið Allan Mørkøre og Rúni Nolsøe, sum eisini hevur verið venjari hjá liðnum. Teir báðir hava spælt í fremstu deild í Føroyum í nógv ár, men í ár hava teir spælt fyri AB í næstfremstu deildini, og tað hevur verið ein týðandi orsøk til, at uppflytingin gjørdist veruleiki.

Heldur tú fram í AB?

- Eg havi bíðað við avgerðini, men nú má eg umhugsa, um eg skal halda fram í AB. Eg dugi ikki at siga tað í løtuni, alt er opið, sigur Rúni Nolsøe.

Hann heldur, at AB hevur spælt so støðugt, sum ein uppflytari má gera.

- Serliga eftir summarsteðgin hava vit spælt støðugt, og royndirnar hjá spælarunum á liðnum komu væl við í teimum avgerandi dystunum. Nú kennist tað sera gott, at tað eydnaðist at vinna uppflytingina. Vit hava trúð upp á tað alla tíðina, men tað kennist alíkavæl sum ein lætti, nú vit eru komnir í Formuladeildina, sigur Rúni Nolsøe.



*AB vann dystin ímóti FSV04 4-1, og tað var nóg mikið til at tryggja sær uppflytingina*

*Mynd: Álvur Haraldsen*